VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin og leygardagin:
Fleyr til gul av norði ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin upp í ein strúk av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men týsdagin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av suðri og møguliga regn. Hitin millum 8 og 12 stig.

Darwin 200 ár
– fyrilestur um oyggja-lívfrøði og lívmenning

Í samband við at Darwin verður 200 ár í ár, verður fyrilestur um oyggjalívfrøði og lívmenning á Náttúrugripasavninum

TÍÐINDASKRIV
Rógvi Nybo
rogvi@sosialurin.fo

Mikudagin 17. juni 2009 fer enski lívfrøðingurin og professarin Robert James Berry (vanliga nevndur Sam Berry) at halda fyrilestur um oyggjalívfrøði og lívmenning klokkan 19.30 í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð.

Sam Berry hevur nýliga givið út bókina Islands, og fyrilesturin fer millum annað at taka støði í bókini.

Høvi verður eisini at síggja smærri framsýningar við lutum úr føroysku náttúruni, ið lýsa læru Darwins.

2009 serstakt Darwin ár

Tiltakið verður skipað í sambandi við, at 2009 er lýst sum eitt serstakt Darwin ár – tað eru 200 ár síðani Charles Darwin varð borin í heim, og 150 ár síðani bókin On the Origin of Species kom út.

Hetta verður eisini hátíðarhildið í Føroyum.

Fróðskaparfelagið, Lívfrøðingafelagið og Náttúrugripasavnið hava í felag lagt eina skrá tilrættis fyri 2009, har tey á ymiskan hátt lýsa persónin Charles Darwin, læruna um lívmenning og hvønn týdning hansara arbeiðið eftirfylgjandi hevur havt á millum annað lívfrøði, heimspeki og bókmentir.

Læran hjá Darwin, um at tær livandi verurnar eru vorðnar til við náttúruligari útveljing gjøgnum milliónir av árum, hevur kollvelt okkara fatan av heiminum, og hevur lært okkum at síggja okkum sjálvi sum ein part av náttúruni.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	4
Qaqortoq	6
Ammassalik	4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	9
Lerwick	10
Aberdeen	10
London	14
Tromsø	--
Bergen	12
Oslo	--
Stokkhólm	12
Keypmannah.	14
Helsinki	12
Moskva	21
Berlin	12
Warzawa	18
Kiev	22
Bukarest	19
Paris	16
Madrid	20
Róm	22
Malorca	24
Athen	30
Malta	23
Tunis	28
Beijing	8
New Dehli	39
Bangkok	32
Jakarta	29
Sydney	18
New York	27
Miami	28
Los Angeles	19
Meksikobýur	--
Panama	30
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt lágtrýst, 1009 hPa., eystan fyri Føroyar grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1019 hPa. yvir Íslandi grynnist eisini.

Komandi nátt:
Lágtrýstið yvir Íslandi grynnist. Hátrýstið yvir Grønlandi breiðir seg hendavegin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/06 kl. 06⁰⁰ – 08/06 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í juni: -8,7° - Mesti hiti máldur í juni: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 07/06 kl. 06⁰⁰ – 08/06 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juni: 2 mm

VESTFALLSKYRRINDI

7. juni	Fullmáni
10. juni	Mánin longst frá jørðini
15. juni	Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
11. juni	10:13	22:33	09:13	21:33	09:28	21:48	-	12:13	00:51	13:13	08:28	20:48	07:28	19:48	10:28	22:48	11:28	23:48	09:58	22:18	11:13	23:33
12. juni	10:53	23:12	09:53	22:12	10:08	22:27	00:33	12:53	01:33	13:53	09:08	21:27	08:08	20:27	11:08	23:27	-	12:08	10:38	22:57	11:53	-
13. juni	11:31	23:49	10:31	22:49	10:46	23:04	01:12	13:31	02:12	14:31	09:46	22:04	08:46	21:04	11:46	-	00:27	12:46	11:16	23:34	00:12	12:31
14. juni	-	12:07	11:07	23:39	11:22	23:54	01:49	14:07	02:49	15:07	10:22	22:54	09:22	21:54	00:04	12:22	01:04	13:22	11:52	-	00:49	13:07
15. juni	00:39	13:11	-	12:11	-	12:26	02:39	15:11	03:39	16:11	11:26	23:58	10:26	22:58	00:54	13:26	01:54	14:26	00:24	12:56	01:39	14:11

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo